REYÐI KROSSUR




# Ársfrágreiðing

# 2020

# Innihaldsyvirlit

**Um Reyða Kross** ........ **4**

**Støðulýsing** ........ **6**

**Nevnd** ........ **8**

**Skrivstova** ........ **8**

**Endurnýtsluvirksemið hjá Reyða Krossi** ........ **9**

Endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka í Tórshavn ........ 10

Endurnýtsluhandilin í Stiðjagøtu í Tórshavn ........ 10

Endurnýtsluhandilin í Vági ........ 11

Klædnainnsavningin og klædnaskiljingin ........ 12

Bókasølan ........ 13

**Tilbúgving** ........ **14**

Hjálparnetverkið ........ 14

Krepputilbúgving ........ 16

Váðameting ........ 16

Kropslig fyrstahjálp ........ 17

Sálarlig fyrstahjálp ........ 17

Ársins Fyrstihjálpari ........ 18

Samarittarnir ........ 19

**Sosialt arbeiði** ........ **20**

Vitjanartænastan ........ 20

Vitjanartænastan í Tórshavn ........ 20

Vitjanartænastan í Norðoyggjum ........ 21

Vitjanartænastan kring landið ........ 22

Verkætlan at menna sosiala økið ........ 23

Mat- og Klædnahjálpin ........ 24

Samstarv við Barnabata um *Jólahjálp* til barnafamiljur í fátækraváða ........ 25

Samstarv við Kvinnuhúsið um at hjálpa kvinnum, sum hava verið raktar av harðskapi ........ 25

Jólagávur til Barnadeildina á Landssjúkrahúsinum, Barnaheimið og Kvinnuhúsið ........ 26

Integratión ........ 26

ABC fyri sálarliga heilsu ........ 27

Ung í Reyða Krossi ........ 27

**Innsavningar ..... 28**
Frímerkir ..... 28
Peningakistlar ..... 28
Landsinnsavningin ..... 28

**Altjóða hjálpararbeiði ..... 29**
Karmar ..... 29
Altjóða starvsfólk hjá RKF ..... 30
Kunningar- og rekrutteringsátøk ..... 31
*Forecast-based action* í Simbabvi ..... 31
Styrkja mótstøðuførið í Malavi ..... 34
Lívbjargandi hjálp til Sýria ..... 35
Trygdarnet til neyðstødd í Etiopia ..... 36
Korona og neyðhjálparátøk í Kenja ..... 37
Grundleggjandi neyðhjálp til Jemen ..... 38

# “Tað er fantastiskt at kunna hjálpa har, ið á stendur. Besta lønin er smílið og takksemið frá móttakaranum”

*Afturmelding frá einum sjálvbodnum*
*í Hjálparnetverkinum ímóti korona*
*í juni 2020*

## Um Reyða Kross

Reyði Krossur er heimsins størsti humaniteri felagsskapur við áleið 14 mió. sjálvbodnum. Endamálið hjá Reyða Krossi er at verja lív og heilsu á virðiligan hátt, og at virka fyri sínámillum semjum, vinalagi, samstarvi og varandi friði millum øll fólkasløg.

Í einum heimi við alt meira avbyrging, spenningum og valdsmisnýtslu er tað grundleggjandi, at Reyði Krossur arbeiðir áhaldandi við at tryggja virðing millum menniskju. Harvið mennist grundarlagið fyri samstarvi millum lond og fólk um at finna loysnir til felags avbjóðingar. Reyði Krossur virkar tí sambært sjey aðalreglum, ið tryggja, at virksemið hjá felagsskapinum er: *menniskjaligt, ópartískt, uttanveltað, óheft, sjálvboðið, ein eind og algildugt.*

Hugsjónin handan Reyða Kross sá dagsins ljós í 1859, eftir at Henry Dunant sá ovurstóra tørvin á humaniterari hjálp í orrustuni við Solferino. Í 1863 varð nevndin hjá Altjóða Reyða krossi, ICRC (*International Committee of the Red Cross*), stovnað, og innan eitt ár høvdu 12 lond skrivað undir hin fyrsta Genevesáttmálan. Hetta var søguliga sæð slóðbrótandi til frama fyri altjóða hjálpararbeiði. ICRC arbeiðir serliga í stríðs- og krígsraktum økjum. Genevesáttmálarnir frá 1949, og fylgiskjøl teirra, geva ICRC heimild til av sínum eintingum at arbeiða í krígsraktum økjum.

Altjóða føderatiónin av Reyða Kross- og Reyða Hálvmánafeløgum, IFRC (*International Federation of Red Cross and Red Crescent Societies*), varð stovnað í 1919. IFRC er meginfelagið fyri tey 192 landsfeløgini, og er serliga virkið tá náttúrukreppur raka.

Reyða Kross- og Reyða Hálvmánafeløg eru í 192 av heimsins londum. ICRC, IFRC og landsfeløgini á tjóðarstigi verða nevnd Altjóða Reyða Kross og Reyða Hálvmána Rørslan, og eru tvinnað saman við teimum sjey aðalreglunum. *Reyði Krossur* og *Reyði Hálvmáni* eru tvey heiti fyri sama felagsskap.

Reyði Krossur Føroya (RKF) er eitt sjálvstøðugt felag, sum varð stovnað hin 2. apríl 1926. Í altjóða høpi er RKF partur av *Røde Kors i Danmark* (RKiD).

## Støðulýsing

Árið 2020 byrjaði sum eitt púra vanligt ár í RKF. Hin 12. mars, tá koronafarsóttin av álvara byrjaði at gera um seg í okkara parti av heiminum, og Føroyar fóru niður í ferð, broyttist alt brádliga: vanliga virksemið hjá RKF varð niðurlagt beinanvegin til tess at verja sjálvboðin ímóti smittuni – tó við undantøkum innan vitjanartænastuna og mat- og klædnahjálpina, ið hildu á fram við at virka undir serligum treytum, av tí orsøk, at tey hava til endamáls at hjálpa viðkvomum borgarum. Avgerð varð samstundis tikin um at íverkseta Reyða Kross tilbúgvingina *Hjálparnetverkið*, ið hevði til endamáls at stuðla og hjálpa borgarum í Føroyum tá kreppur raka. Hjálparnetverkið varð virkið ein stóran part av árinum ímeðan koronafarsóttin gjørdi um seg. Áleið 130 sjálvboðin vóru partur av hesari skipan, harav uml. 100 vóru nýggj sjálvboðin, ið púra spontant valdu at melda seg til.

Við virðing fyri almennu koronatilmælunum, varð Landsinnsavningin 2020 ikki skipað sum ein *hurð-til-hurð* innsavning, men heldur sum ein beinleiðis sjónvarpssending úr Norðurlandahúsinum. Við í sendingini vóru eitt nú áhugaverdar og rørandi samrøður við sjálvboðin, góður tónleikur og kunning um hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi. Harumframt høvdu tey, ið lótu pening umvegis telefonlinjuna 905656, møguleika at vinna ein Suzuki Swift Hybrid, ið Berg Motors gav Reyða Krossi til hetta endamál. Úrslitið av innsavningini var heilar kr. 3,75 mió. Hetta er nógv hin besta landsinnsavningin nakrantíð, og er sanniliga ein staðfesting av, at føroyingar hava eitt stórt hjarta.

Sum heild, var vanliga virksemið í 2020 í sera stóran mun tillagað av koronafarsóttini, og Reyði Krossur valdi áhaldandi at virða almennu tilmælini í øllum sínum virksemi.

Nevnast kann, at vitjanatænastan varð tillagað soleiðis, at samskift varð umvegis telefon, og serliga seinastu mánaðirnar í árinum, hevur stórur áhugi verið fyri at gerast vitjanarvinur. Eisini var endurnýtsluøkið tillagað, soleiðis at tað tíðum var neyðugt at halda stongt á øllum økjunum.

Spontant sjálvboðin í Hjálparnetverkinum vórðu fleiri ferðir til reiðar at lyfta vanligar uppgávur í Reyða Krossi, soleiðis at tað ikki var neyðugt at heita á sjálvboðin, sum vóru í vandabólki.

Sosiala virksemið hjá RKF varð høgt raðfest í 2020, og nýggja hjálpartænastan *Mathjálpin* sá dagsins ljós í mars mánað, samstundis sum Hjálparnetverkið varð stovnað. *Mathjálpin* hevur ta endamál at veita frystan døgurðamat til fíggjarliga sperdar familjur ella einstaklingar.

Í samstarvi við Barnabata lat RKF gávukort áljóðandi kr. 1.000 til 270 fíggjarliga sperdar barnafamiljur í Føroyum í sambandi við átakið *Jólahjálp*. Hetta er annað árið á rað at RKF hevur samstarvað við Barnabata um *Jólahjálp*, og hevur RKF fingið sera góðar afturmeldingar.

RKF lat tilsamans kr. 4 mió. til altjóða verkætlanir hjá Reyða Krossi í 2020. Stuðulin fór bæði til almenn átøk hjá Reyða Krossi innan eitt nú *heilsu* og *útbúgving*, og til serlig átøk at basa koronafarsóttini. Altjóða starvsfólkið hjá RKF í Keypmannahavn arbeiddi við nógvum

bráðfeingis átøkum kring heimin, og hevði eitt nú ábyrgd at skipa fyri hjálparátøkum at basa koronafarsóttini í Kenja. Síðst í 2020 var avgerð tikin um at senda altjóða starvsfólkið út til verkætlanir í Kenja, umframt at ein verkætlanardelegatur hjá RKF eftir ætlan skal sendast til Malavi í august 2021.

Hóast árið 2020 var eitt sera avbjóðandi ár fyri okkum øll, og stórur tørvur var á hjálpartænastum hjá Reyða Krossi, ber til at staðfesta, at við áhaldandi og miðvísum arbeiði, kunnu bæði sjálvboðin, starvsfólk, samstarvsfelagar og peningaligir stuðlar gera stóran mun, bæði úti og heima.

RKF takkar øllum hjartaliga fyri trúgva stuðulin í 2020.

## Nevnd

Nevndin, sum er evsti myndugleiki hjá RKF, er øll sjálvboðin. Hon er mannað við 5 nevndarlimum og 2 varalimum, sum øll eru sjálvboðin. Nevndin verður vald á aðalfundinum. Nevndarlimirnir vera valdir fyri tvey ár, og varalimirnir fyri eitt ár. Annað hvørt ár standa tveir nevndarlimir fyri vali, og annað hvørt standa hinir tríggir fyri vali. Á regluligum fundum viðger nevndin mál av týdningi saman við skrivstovuni. Sjálvboðin verða boðin við á nevndarfund, um tørvur er á tí.

Nevndararbeiðið í 2020 var í stóran mun merkt av støðuni við koronafarsóttini, og 9 nevndarfundir vóru hildnir í tíðini tá korona leikaði harðast á. Umframt hesar vóru 9 nevndarfundir hildnir í árinum. Sum heild, var 2020 eitt sera virkið ár hjá nevndini, og mong týðandi mál vórðu viðgjørd.

## Skrivstova

Skrivstovan hevur ábyrgd av at skipa, reka og menna dagliga virksemið hjá RKF. Tað verður gjørt í samstarvi við nevndina, virksemisleiðarar og sjálvboðin. Skrivstovan hevur dagligu ábyrgdina av virkseminum hjá RKF.

Tvey starvsfólk arbeiða á skrivstovuni og vóru í 2020 lønt tilsamans 65 tímar um vikuna, sum tey einastu fastløntu størvini í RKF.

Í 2020 arbeiddi skrivstovan við fylgjandi økjum:

- Hjálpararbeiði innan eitt nú sosiala økið, átøk til frama fyri viðkvæmar bólkar í Føroyum og altjóða humaniterari hjálp. Í 2020 var skrivstovan serliga virkin innan krepputilbúgvingina.

- Rakstur og menning av virksemisøkjunum hjá RKF, t.d. samskifti við sjálvboðin, fíggjarviðurskiftum, kunning, heimasíðuni, sosialum miðlum, lýsingum og at loysa uppgávur saman við sjálvbodnum.

- Samskipan av tiltøkum og verkætlanum, t.d. ársins fyrstuhjálpara, trivnaðartiltøkum fyri sjálvboðin og fundum. Í 2020 hevði skrivstovan ein sera virknan leiklut í at samskipa landsinnsavningina.

- Samstarv við fyritøkur, kommunur, stovnar, RKiD, *Rauði Krossinn á Íslandi*, arktisk landsfeløg hjá Reyða Krossi, felagsskapir og við Føroya Landsstýri.

## Endurnýtsluvirksemið hjá Reyða Krossi

Í byrjanini av 2020 hevði Reyði Krossur eitt umfatandi endurnýtsluvirksemi, og samanlagt vóru áleið 120 sjálvboðin í hesum virksemisøki. Klædnainnsavningin savnar inn eina stóra mongd av klæðum í bingjum kring landið, meðan Klædnaskiljingin hjá Reyða Krossi í Stiðjagøtu í Havn skilir klæðini.

Skildu klæðini fara millum annað til endurnýtsluhandlarnar og klædnahjálpina, sum hjálpir familjum, ið ikki eru so væl fyri fíggjarliga. Í 2020 varð tænastan *Mathjálpin* løgd afturat Klædnahjálpini, og tekur hon ímóti frystum døgurðamati.

Eisini tekur Reyði Krossur ímóti bókum, frímerkjum og nakað av lutum.

RKF hevur fýra endurnýtsluhandlar: í Tórshavn eru bókasølan í Vágsbotni, og klædnahandlar á Bryggjubakka, í Stiðjagøtu og í Vági.

Endamálið við endurnýtsluvirkseminum er at savna pening til arbeiðið hjá Reyða Krossi bæði í Føroyum og kring heimin.



## Endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka í Tórshavn

Inntøkan í 2020 var kr. 85.000, sum er nógv minni enn í 2019, tá inntøkan var áleið kr. 238.000. Høvuðsorsøkin til stóra munin er, at virksemið varð so nógv avmarkað til tess at verja sjálvboðin ímóti koronafarsóttini.



Í byrjanini av árinum vóru umleið 30 sjálvboðin, ið mannaðu handilin 4 dagar um vikuna, týsdag til fríggjadag kl. 13.30-17.30 umframt mánadagar, har 2 hold á 4-5 kvinnur prísaðu og hongdu klæðir upp. Handilin var stongdur ein stóran part av árinum, og nógv av okkara dugnaligu og trúføstu sjálvbodnum fingu boð um at halda seg heima til tess at verja seg ímóti smittuni. Hóast støðan batnaði eitt sindur gjøgnum árið, og handilin at enda megnaði at hava opið tveir dagar um vikuna, verður mett, at koronafarsóttin framhaldandi fer at avmarkað virksemið í handlinum inntil sjálvboðin eru koppsett.

Eftir umstøðunum hava myndir verið lagdar út á facebook*bólkin* hjá handlinum, og miðskeiðis í árinum varð ein facebook*síða* stovna, til tess at røkka fleiri áhugaðum. Í løtuni eru útvið 2.000 brúkarar á *bólkinum*, og útvið 1.000 dáma *síðuna*. Miðjað verður ímóti at brúka síðuna í størri mun, tí at hon er ein betri sýnisgluggi.

Sjálvboðin eiga eina sera stóra tøkk uppiborna fyri tolsemið og nærlagdni, ið hevur verið víst í 2020.

Reyði Krossur hevur havt endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka síðani 2006. Handilin er skipaður við einum leiðara og tveimum varaleiðarum, og ein sjálvboðin varðar av hvørjum vikudegi sær.

## Endurnýtsluhandilin í Stiðjagøtu í Tórshavn

Inntøkan í Endurnýtsluhandlinum í Stiðjagøtu var kr. 866.000. Hetta er ein minking í mun til í 2019, tá sølan var kr. 974.000. Tó má ásannast, at tað er eitt avbera gott úrslit, tá hugsað verður um, at handilin var stongdur í 15 vikur tilsamans, tá korona leikaði harðast á: í mars, apríl, mai og í august. Handilin var opin 36 leygardagar í 2020.

Harav seldi Barnadeildin fyri kr. 258.000. Hetta er ein øking í mun til søluna í 2019 (kr. 236.000), sum er ómetaliga flott, í mun til, at handilin var stongdur í 15 vikur.




Tá koronafarsóttin fór at gera um seg í Føroyum í mars 2020, varð virksemið í Endurnýtlsuhandlinum steðgað, saman við mest øllum virksemi í Reyða Krossi. Leygardagin 30. mai varð latið upp aftur eftir koronasteðgin. Fyri at fylgja almennu tilmælunum um frástøðu, varð víðkað um handilin við at taka ein part av garasjuni við í handilin, og sostatt fáa nógv størri pláss. Garasjan er framvegis partur av handlinum, og hetta hevur eydnast sera væl. Tað hevur, sum heild, havt góða ávirkan, at handilin varð víðkaður. Hetta kann møguliga skiljast sum eitt tekin um, at grundarlag er fyri at vaksa um handilin.

Tað er ein sannroynd, at barnadeildin er ov trong. Tá garasjan varð tikin uppí handilin varð barnadeildin ikki víðkað. Arbeitt verður við eini loysn, at víðka um barnadeildina eisini.

Skrivstovan hevur í síðsta árið havt ein størri leiklut í virksemisleiðsluni av handlinum, samstundis sum vikuligu toymini hava fingið størri ábyrgd fyri hvørjari viku sær.

Korona hevði við sær, at nøkur sjálvboðin trektu seg frá virkseminum, og vilja vit takka teimum fyri trúgva og góða hjálp í undanfarin ár. Samstundis vóru onnur, ið tillagaðu arbeiðið, fyri at sleppa undan at koma í samband við ov nógv fólk. Nøkur nýggj eru byrjað í 2020 bæði í handlinum og í barnadeildini. Harímillum eru fleiri dugnalig ung, sum eru ómetaliga dugnalig. Hóast umstøðurnar, gleðast vit um, at sølan er hækkað seinasta árið, og harvið fylgir eisini meira arbeiði.

Handilin er framvegis opin leygardagar klokkan 10 til 15. Hann selur góð, smart og øðrvísi klæðir til allar aldursbólkar frá endurnýtsluni hjá Reyða Krossi.

## Endurnýtsluhandilin í Vági

Í 2020 seldi endurnýtsluhandilin í Vági fyri kr. 78.500. Hetta er ein stór øking á áleið kr. 41.500 í mun til 2019, tá sølan var kr. 37.000.

Endurnýtsluhandilin í Vági hevur hildið til í einum góðum handilshøli í bygdini, men varð frá 2020 staðsettur í nýggjum hølum á Gørðunum. Í 2020 vóru eini 7 sjálvboðin virkin í

endurnýtsluhandlinum í Vági. Til tíðir vóru nøkur ung sjálvboðin fús at taka myndir til handilin, og at leggja út á bæði facebooksíðuna og á instagram.

Í byrjanini og endanum av árinum var handilin opin fýra dagar um vikuna. Mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 14.00 til 17.30 og leygardag kl. 10.00 til 13.00. Eins og við øðrum virksemisøkjum, varð virksemið steðgað stórar partar av árinum.

Handilin er skipaður við einum leiðara.

Mánadag og mikudag eru tríggjar til fýra sjálvbodnar kvinnur í handlinum. Fríggjadag og leygardag eru ein til tvær í handlinum. Hetta liggur í fastari skipan.

Tey sjálvbodnu skilja eisini klæðir, teir dagarnar handilin er opin. Eisini skipa tær fyri, at kaffi, te og annað verður sponsorerað av privatum fólki og handlum har um leiðir.

Reyða Kross Endurnýtsluhandilin í Suðuroy læt dyrnar upp á sumri í 2011.

## Klædnainnsavningin og klædnaskiljingin

Inntøkan fyri 2020 var áleið kr. 239.000 í mun til í 2019, tá inntøkan var áleið kr. 303.000.

Eins og onnur virksemisøki, vóru bæði klædnainnsavningin og skiljingin steðgað orsakað av koronafarsóttini hin 12. mars. Hareftir varð virksemið sera avmarkað fram til eftir summarfrítíðina. Reyði Krossur heitti fleiri ferðir alment á viðskiftafólk um at bíða við at leggja klæðir í klædnabingjurnar, til vanliga virksemið aftur varð komið í gongd. Av tí at fleiri sjálvboðin á økinum vóru í vandabólki, varð stundum neyðugt at heita á yngri sjálvboðin í Hjálparnetverkinum, sum vóru fús at koyra kring landið, tá hetta var neyðugt.




Seinni í árinum vórðu 4 bingjur afturat settar úti í Stiðjagøtu. Reyði Krossur hevur sostatt 28 bingjur kring landið: í Klaksvík, Fuglafirði, Saltangará, Miðvági, Vestmanna, Vági, Tórshavn og á Tvøroyri.

Umframt innsavning av endurnýtsluklæðum hava klædnainnsavningin ábyrgdina av, at innsavnaðu klæðini verða send av landinum eftir skiljingina. Í 2020 vóru 11 bingjur sendar til Týsklands, við uml. 10 tonsum av klæðum í hvørjari. Harvið kann sigast, at hóast broyttu umstøðurnar, var nøgdin av klæðum, sum kom inn, aftur rættiliga stór. Tíverri varð prísurin

fyri sølu av klæðum lækkaður kring alt Evropa, so inntøkan frá bingjunum til Týsklands var nakað minni enn í 2019.

Onnur ábyrgdarøki í klædnainnsavningini eru, millum annað, flutningur millum hølini í Stiðjagøtu og Bryggjubakka, ruskkoyring, viðlíkahald av bilinum, viðlíkahald av bingjunum kring landið og ymiskar aðrar uppgávur. Tað verða savnaðir áleið 200 sekkir av klæðum um vikuna.

18 sjálvboðin eru virkin í Klædnainnsavningini, og fleiri sera røsk og dugnalig sjálvboðin løgdust afturat í 2020.

Tá klæðini eru savnað saman, verða tey skild úti í Stiðjagøtu. Klædnaskiljingin er ein stórur partur av endurnýtsluvirkseminum hjá Reyða Krossi. Eini 65 sjálvboðin eru knýtt at hesum virkseminum, og tey eru skipað í bólkar. Tey flestu av teimum hava verið í Reyða Krossi í nógv ár, men nakrar nýggjar eru tó komnar afturat í seinastu 2 árini.

Fleiri dagar í vikuni verða innkomin klæðir skild. Klæðini verða skild soleiðis, at nakað fer í endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka, í Stiðjagøtu, til Vágs og til klædnahjálpina, ið hjálpir fíggjarliga sperdum einstaklingum og familjum, meðan ein partur verður sendur av landinum.

Klædnaskiljingin er skipað við einum yvirskipaðum virksemisleiðara og einum leiðara fyri hvønn skiljibólk. Tørvur er tí altíð á fleiri sjálvbodnum, bæði til vanliga virksemið, og til at skipa fyri og menna økið.

## Bókasølan

Í mun til umstøðurnar við koronafarsóttini, gekk hampiliga væl við bókasøluni. Inn komu áleið kr. 126.000, sum er nakað minni enn í fjør.

Vælvitjaða Reyða Kross Bókasølan í Vágsbotni í Havn er eitt slag av sjálvtøku, har fólk keypa bøkur og gjalda uttan nakað eftirlit. Bókasølan er opin sjey dagar um vikuna.

Bókasølan er skipað við einum leiðara. Átta sjálvboðin eru knýtt at Bókasøluni. Trý sjálvboðin halda dagliga eyguni við bókasøluni, ið hevur opið allar sjey dagar í vikuni. Afturat teimum trimum, eru átta sjálvboðin, ið eftir fastari skipan lata upp og læsa morgnar og kvøld.

Hvørt mikukvøld millum kl. 19.00 og 21.00 hittast sjálvboðin í bókasøluni og hava opið, soleiðis at fólk hava høvið at koma við bókum og øðrum. Hetta eina kvøldið í vikuni koma ofta onnur inn á gólvið og fáa ein kaffimunn og eitt prát. Hetta eru serliga menn, ið eru knýttir at bókasøluni, ella menn, ið fyrr hava verið virknir í Reyða Krossi. So til ber at siga, at hetta mikukvøldið eisini er eitt sosialt mannfólkakvøld í Reyða Krossi.

Bókasølan fær allar bøkurnar ókeypis, og útreiðslurnar eru nærum ongar, tí munar bókasølan ógvuliga væl í virkseminum hjá Reyða Krossi. Lýst verður við bókasøluni á facebook.

## Tilbúgving

Orsakað av koronafarsóttini, var 2020 eitt ómetaliga virkið ár innan krepputilbúgvingina, *Hjálparnetverkið*. Av somu orsøk vóru onnur øki innan tilbúgvingina minni virkin. Reyði Krossur bjóðar hesar tilbúgvingartænastur út: hjálparátøk, tá kreppur raka, váðameting, undirvísing innan kropsliga og sálarliga fyrstuhjálp og samarittatænastu. Eisini verður ljós varpað á týdningin av fyrstuhjálp, við tiltakinum *Ársins fyrstihjálpari*.

### Hjálparnetverkið

Reyða Kross tilbúgvingin, *Hjálparnetverkið*, hevur til endamáls at stuðla og hjálpa borgarum í Føroyum tá kreppur raka, og varð íverksett 12. mars til tess at stuðla og hjálpa borgarum við avbjóðingum, ið koronafarsóttin hevði við sær. Samstundis varð vanliga virksemið hjá RKF niðurlagt, serliga til tess at verja sjálvboðin ímóti smittuni – tó við undantøkum innan vitjanartænastuna og mat- og klædnahjálpina, ið hildu á fram at virka undir serligum treytum, av tí orsøk, at tey hava til endamáls at hjálpa serliga viðkvomum borgarum.




Áðrenn Føroyar for niður í ferð vóru ábyrgdarlækni hjá RKF og dagligi leiðarin á fundi við umboð fyri Landssjúkrahúsið, um átøk at basa koronafarsóttina. Umboðini frá RKF fingu hareftir innbjóðing á fund við farsóttarnevndina fyrrapartin 11. mars, at kunna um virksemið og tænastur hjá RKF.

Ímeðan farsóttin COVID-19 gjørdi um seg, vóru upp ímóti 130 sjálvboðin partur av hesari skipan, harav uml. 100 vóru nýggj sjálvboðin, ið púra spontant valdu at melda seg til. *Hjálparnetverkið* fekk nógvar áheitanir umvegis tilbúgvingarnummarið 1818, ið svaraði allar dagar frá 8-22 í fyrstu mánaðirnar.

Skrivstovan stóð fyri bæði menning og rakstri av tænastunum í Hjálparnetverkinum, men eftir nakrar dagar løgdust nøkur sera dugnalig sjálvboðin afturat nýggju vaktarskipanini. Vaktarskipanin varð hareftir samansett av 18 sjálvbodnum, einum starvslesandi, og báðum starvsfólkunum á skrivstovuni.

Tænasturnar, ið vóru bodnar út vóru eitt nú:

- Sálarfrøðilig ráðgeving frá løggildum sálarfrøðingi.
- Koyring til og frá sóttarhaldi og heimauppihaldi.
- Vitjanartænasta umvegis telefon.
- Praktiskar uppgávur, sum eitt nú at ganga túr við hundi ella innkeypi.
- Vegleiðing til tilflytarar.
- Sóttarhaldsráðgeving til borgarar ella avvarandi til fólk í sóttarhaldi ella heimauppihaldi.
- Mat- og klædnahjálp til fíggjarliga sperdar familjur.

Ígjøgnum árið hevði skrivstovan dagligu leiðsluna av *Hjálparnetverkinum*, og arbeiddi áhaldandi við at menna mannagongdir fyri nýggju hjálpartænasturnar, og tryggja, at allar tænasturnar vórðu hildnar á dygdargóðum stigi. Hetta var gjørt í góðum samstarvi við sjálvboðin, við spontant sjálvboðin, við nevnd, við onnur landsfeløg og við landsins leiðandi serfrøðingar og læknar, ið góvu sera góða vegleiðing at handfara og fyribyrgja smittuspjaðing.




Umframt nevndu tænastur, varð eisini samstarvað við *Rauði Krossinn á Íslandi*, sum framleiddi fjølbroytt tilfar til RKF um kreppuhandfaring, eitt nú innan handfaring av sóttarhaldsøkjum (Quarantine Centres).

Hjálparnetverkið varð eisini bjóðað út til enskt talandi borgarar, undir heitinum *Corona Support Network*. Hetta gav góðar afturmeldingar, bæði frá føroyskt og enskt talandi borgarum.

Í summarfrítíðini fekk RKF áheitan frá heilsumyndugleikunum um at seta á stovn eina sóttarhaldsráðgeving til borgarar, og avvarandi til borgarar, ið skuldu í ella sótu í sóttarhaldi ella heimauppihaldi. Sóttarhaldslinjan varð hareftir løgd afturat Hjálparnetverkinum.

Fyritøkur góvu Reyða Krossi góðan avsláttur, tá ið útgerð og tilfar skuldi keypast inn til nýggju tænasturnar, og fleiri fyritøkur lótu peningagávur til frama fyri koronaátakinum. *Betri Stuðulsgrunnurin* valdi eitt nú at lata kr. 200.000 til *Hjálparnetverkið*, og *Føroya Stiftstjórn* lat kr. 100.000 til Reyða Kross, saman við einari vakrari heilsan, til heiðurs fyri tann stóra innsatsin, ið sjálvboðin í Reyða Krossi gjørdu hesa tíðina. Heilsanin frá *Føroya Stiftstjórn* hongur nú í hølunum í Stiðjagøtu.

Harumframt samstarvaðu Reyði Krossur og Landssjúkrahúsið um at vegleiða og kunna viðskiftafólk á Landsjúkrahúsinum um reinføri, frástøðu og almennu tilmælini, soleiðis at starvsfólk á Landssjúkrahúsinum kundu hugsavna seg um aðrar týðandi uppgávur.

Á jólum vóru hølini hjá Reyða Krossi á Bryggjubakka 10 skipað sum bíðiøki fyri ferðandi til Suðuroyar, sum ynsktu at verja seg ímóti koronafarsóttini. Og Reyði Krossur bjóðaði viðkomandi tænastur út umvegis *Hjálparnetverkið* um jólini, tá nógvir útisetar komu heim.

## Krepputilbúgving

Sambært *Menningarætlanini fyri humanitert arbeiði: í Føroyum og úti í heimi, 2018-2020* varð eftir umstøðunum arbeitt við at menna karmar og førleikar innan tilbúgvingina hjá Reyða Krossi.

Í oktober mánað luttók skrivstovuleiðarin á førleikamennandi skeiði innan regionalu *Surge*-tilbúgvingina hjá Reyða Krossi saman við umboðum úr landsfeløgum í Baltisku regiónini. Regionala *Surge*-tilbúgvingin er liður í tilbúgvingini hjá altjóða Reyða Krossi, og hevur til endamáls at veita bráðfeingis hjálp, um vanlukkur raka. Regionala samstarvið fer eftir ætlan at stuðla undir menningina av tilbúgvingini hjá RKF.

RKF og RkiD hava avtalu um, at RKF eftir tørvi kann samstarva við onnur landsfeløg um førleikamenning, eitt nú innan tilbúgving. Arbeitt verður við at skilmarka karmarnar fyri hesi skipan.

Orsakað av koronafarsóttini varð arbeiðið við tilbúgvingini nógv avmarkað.

## Váðameting

Arbeiðið við váðametingini fyri Føroyar, sum byrjaði í 2019, var sera nógv seinkað orsaka av koronafarsóttini, og persónligum avmarkingum í arbeiðsbólkinum fyri váðametingina. Eftir ætlan skal váðametingin brúkast til at skipa og menna hjálpararbeiðið hjá RKF. Harvið er ætlanin at økja trygdina í Føroyum, við at lýsa humaniterar váðar í føroyska samfelagnum: hvørjir samfelagsborgarar eru í størsta váða, hvørjar førleikar hevur føroyska samfelagið at standa ímóti kreppum (mótstøðuføri/resilience), og hvørjir førleikar eru at loysa hesar avbjóðingar.

Á leið 30 serfrøðingar innan tilbúgving og sosialt arbeiði í Føroyum vóru við í kvalitativu kanningini, og ein væleydnað spurnakanning varð skipað. Ætlanin var at skipa fyri skriviborðsvenjingum í 2020, men hetta var tíverri avlýst, til tess at forða fyri smittuspjaðing. Sum loysn, var venjingin send út sum online spurnakanning. *Betri Stuðulsgrunnurin* stuðlaði Reyða Krossi við kr. 200.000 til hesa verkætlan, ið verður skipað sambært einum altjóða leisti, sum Reyði Krossur brúkar um allan heim. Eisini í hesum høpi hevur stuðulin frá *Betri* hjálpt Reyða Krossi at skipa og menna virksemið sítt, soleiðis at Reyði Krossur á dygdargóðan hátt eisini fær skipað humanitert hjálpararbeiði í Føroyum.

## Kropslig fyrstahjálp

Tað eru nógv talandi dømi um, at tá okkurt hendir onkrum, so er tað rættiliga avgerandi fyri, um lívið kann bjargast, at fólk við grundleggjandi førleikum kunnu taka sær av tí skadda.

Í 2020 hevði fyrstahjálpin kr. 167.700 í inntøku. Hetta er kr. 93.350 meir enn í 2019, tá inntøkan var kr. 74.800, og er inntøkan sostatt meir enn tað dupulta frá undanfarna ári. Tilsamans fingu 271 fólk prógv frá Reyða Krossi í 2020.

Tó skal nevnast, at koronafarsóttin avmarkaði virksemið á økinum nógv, eitt nú soleiðis, at tað gjørdist neyðugt at útseta nøkur skeið til 2021.

Líkt er til, at samfelagið gerst alt meira tilvitað um týdningin av, at so nógv sum gjørligt hava grundleggjandi fyrstuhjálparskeið. Serliga sæst hetta við tað, at fyritøkur vísa áhuga fyri at geva sínum starvsfólkum skeið í fyrstuhjálp.

Mest eftirspurt var skeiðið í hjartasteðgi og nýtslu av AED (hjartastartara).

Á heimasíðuni hjá Reyða Krossi er parturin um fyrstuhjálp eisini dagførdur, soleiðis at bæði prísir og samansetingar av skeiðum eru betri tillaga til frama fyri kundar.

## Sálarlig fyrstahjálp

Grundað á drúgvar royndir og úrslit frá áralangari gransking, hevur Altjóða Reyði Krossur ment skeið í sálarligari fyrstuhjálp. RKF hevur í 2020 arbeitt við at menna hesa tænastu í Føroyum og í 2020 vórðu tvey skeið í sálarligari fyrstuhjálp hildin.

Skeiðini hjá RKF, ið síggjast á heimasíðuni, byggja á henda leist hjá Altjóða Reyða Krossi. Tóra Petersen, sálarfrøðingur, hevur undirvíst vegna Reyða Kross og verið við til at tryggja fakligu góðskuna á hesum skeiði.

Reyði Krossur bjóðar skeið í sálarligari fyrstuhjálp til øll áhugað - uttan mun til útbúgving og royndir. Skeiðini eru viðkomandi fyri bæði einstaklingar, stovnar og arbeiðspláss, sum ynskja at økja um mótstøðuførið og at tryggja sær førleikar at hjálpa sær sjálvum og øðrum, um ein kreppa rakar.

Nøkur dømi um, nær sálarlig fyrstahjálp er góð at duga eru: tá ein ólukka hendir, tá onkur er fyri harðskapi, fær staðfest álvarsliga sjúku ella fer á húsagang, tá ein av teim nærmastu letur lív, tá stórar vanlukkur raka, ella tá vit eru vitni til eina álvarsliga hending.

## Ársins Fyrstihjálpari

Heiðurin *Ársins Fyrstihjálpari 2020* fór til Bragdafólkini Joan Mouritsen, Herluf Jakobsen, Súna Jacoben, Heidi Jógvansdóttir, Beintu Napoleonsdóttir, Kristín Baldvinsdóttir, Hjalmar Sjóvará, Ruth Winther, Andrew Hansen og Niels Poulsen fyri at veita lívbjargandi fyrstuhjálp.

Tað var ein sunnudagur í februar, at eitt lið frá Bragdinum hittust á Tórsbreyt at renna. Tá Hilmar skuldi gera seg til at taka felagsmynd, small hann niður. Bragdafólkini lupu til, og Joan tók leiðsluna beinanvegin. Róliga fór hon í gongd við at kanna, hvussu støðan hjá Hilmari var. Ringt var 112 beinanvegin. Hon bað um ein hjartastartara og fór so sjálv í gongd við at geva hjartamassagu, saman við Herlufi. Í garaguni hongur ein hjartastartari og har leyp onkur inn eftir honum. Hann riggaði ikki. So var eitt at gera. At senda øll í hvør sína ætt at finna ein annan. Gott við rennarum – tey runnu yvir í Yndi og oman í svimjihøllina. Tey gjørdu skjótt av, góvu Joan startaran og hon arbeiddi við Hilmari til sjúkrabilurin tók yvir. Í allari rokanini, var Joan tann róliga. Fekk Herluf at hjálpa sær og hann bað eina ringja til konu Hilmar, sum var við hús og visti av ongum.
Alt gekk skjótt og væl fyri seg, eftir umstøðunum. Tá sjúkrabilurin hevði latið Hilmar í hendurnar á teimum kønu á Landssjúkrahúsinum, koyrdu teir aftur á Tórsbreyt, fyri at kunna tey í Bragdinum um støðuna. Har fingu tey rós frá portørunum, at tey høvdu handlað so skjótt og væl.

Umframt Bragdafólkini, sum fingu heiðurin *Ársins Fyrstihjálpari*, vóru eisini tveir aðrir tilburðir heiðraðir fyri gott avrit innan fyrstuhjálp í 2020.



Annað plássið fór til Zoran Vujovic, ið bjargaði vitleysum manni, við at opna læsta kjálkabeini og hála tunguna, sum maðurin, í stoytinum, hevði svølgt, uppá pláss aftur, og legði hereftir mannin í læsta síðulegu, inntil serkøn hjálp kom á staðið.

Triðja plássið fór til Ivy Jakobsen og Edvard Skúvadal, ið skundisliga hjálptu kvinnu, ið misti vitið. Tað gingu 45 minuttir inntil tyrlan kom á staðið, og í hesar minuttir høvdu tey bæði tamarhald á støðuni.

Øll, sum fáa heiður til Ársins Fyrstuhjálparar, fáa heiðursbræv frá Reyða Krossi og blómutyssi frá *Betri Trygging*. Fyrsta plássi, sum er kosin til Ársins Fyrstihjálpari fær eisini eina peningaupphædd frá Betri Trygging. Hjartaliga tillukku!



## Samarittarnir

Samarittarnir høvdu áleið kr. 70.000 í inntøku í 2020, sum er ein stór minking frá 2019, tá inntøkan var kr. 230.000. Orsøkin til minkingina var koronafarsóttin.

Virksemið hjá samarittunum var stak friðaligt í 2020. Virksemið byrjaði í februar við eini størri venjing saman við Norðoya Bjargingarfelag, Norði á Strond í Klaksvík. Í mars byrjaði koronasóttin at gera um seg, og alt vanligt virksemi steðgaði. Øll tiltøk, sum samarittarnir luttaka á,vóru avlýst. Ólavsøkan var tó undantikin, og varð hon skipað øðrvísi og sambært almennu tilmælunum frá heilsumynduleikunum.
Hjálparnetverkið var sett á stovn, og fleiri samarittar vórðu virknir í hesi tilbúgving, m.a. við telefonvakt, sóttarhaldskoyring og við sóttarhaldslinjuni. Útbúgvingarnar av nýggjum næmingum, sum skuldi verða í mars, varð útsett til juni, og vóru tá 12 samarittnæmingar útbúnir. Eisini eydnaðist tað at fáa útbúgvið 7 samarittassistentar. Venjingar hava verið við jøvnum millumbili, og við avmarkaðum luttakaratali, gjøgnum summarið. Samarittarnir eru bjartskygdir, og vóna at samarittavirksemið verður *vanligt* aftur í 2021.

*Betri Stuðulsgrunnurin* er høvuðsstuðul hjá samaritttænastuni. Sjálvboðin eru sera fegin um stuðulin, og Betri eigur eina hjartans tøkk uppiborna.

## Sosialt arbeiði

Reyði Krossur hevur eina røð av hjálpartænastum innan sosiala økið: vitjanartænastu, mat- og klædnahjálp og bókagávur til børn kring landið. Integratiónsøkið hevur sambinding/intertwining og familjulegu fyri tilflytarar, og arbeitt verður við nýggjum virksemisøki, *Familjuvinir*, sum er ein vitjanartænasta fyri tilflytarar.

Vitjanartænastan hjá Reyða Krossi er partur av verkætlanini hjá Fólkaheilsuráðnum *ABC fyri sálarliga heilsu*, og í 2020 vórðu hjálparpakkar gjørdir í samstarvi við Barnabata til tess at hjálpa barnafamiljum í fátækraváða, og í samstarvi við Kvinnuhúsið, sum arbeiðir við at hjálpa kvinnum og børnum, ið eru harðskapsrakt.

### Vitjanartænastan

Hóast vitjanartænastan varð nógv ávirkað av koronafarsóttini, eru nú yvir 60 vitjanarvinir kring landið. Teir vitjaðu tilsamans í uml. 1.000 tímar í 2020. Hetta er ein minking í mun til árið frammanundan, tá tímatalið var uml. 1.600. Vitjanartænastan hjá Reyða Krossi hevur ongar fastar inntøkur, og arbeitt verður við at finna ein høvuðsstuðul til hetta økið.

Tá vanliga virksemið varð niðurlagt, og tað ikki longur var ráðiligt at vitja á staðnum, fekk vitjanartænastan boð um, at sjálvboðin í størst møguligan mun áttu at halda á fram við at ringja til tey, ið nú sótu avbyrgd. Hóast hetta ikki var ein ynskistøða, so gekk hetta eftir umstøðunum væl.

### Vitjanartænastan í Tórshavn

Talið av vitjanarvinum er nógv økt í meginøkinum, og nú eru yvir 40 vitjanarvinir. Nøkur eru farin frá, og onnur komin til, men serliga eftir stóru landsinnsavningina, er áhugin nógv øktur. Reyði Krossur hevur vitjanarvinir á sambýlunum Oman Mattalág og Vallalíð. Eisini hava vit vitjanarvinir á Tjarnagarði og heima hjá fólki. Vit hava Undirhús á Boðanesheiminum og á Lágargarði. Harumframt hava vit fólk, sum lesa upp á røktarheimum og sambýlum.

Í februar fekk leiðslan fyri vitjanartænastuna í meginøkinum eina framløgu á einum ABC tiltaki um eitt grannalag, sum hevur eitt sera virkið eigarafelag. Í februar varð fundur við Anne Mette Greve frá Fólkakirkjuni, ið greiddi frá um Diakonarbeiði/hjálpararbeiðið hjá Kirkjuni. Hon leitar eftir fólki at starvast við hjálpararbeiði hjá kirkjuni. Tað er lønt starv og skal nokk lýsast. Tað minnir um hjálparpreststarv, eitt nú við at fara út til fólk við sorg.

Í juni var ein týsk dama, sum búði á Hotel Hafnia í eina viku, sum ynskti at fáa ein vitjanarvin, hon kundi ikki ganga og sat í koyristóli.  Hon vildi sleppa niðan á Vaglið og á Býarbókasavnið. Vitjanarvinurin, sum segði ja til at vitja hana, var 7 mánar við barn, men alt gekk væl allíkavæl.

Maður til vitjanarvinin  var við, og tey koyrdu týsku damuna runt í gomlu Havnini og Vágsbotni. Týska daman var sera takksom, hon var yvir 80 ár, hon segði, at hon brúkti ofta Reyða Kross, tá hon ferðaðist og at hon elskaði Føroyar og Vaglið, og hevur ofta verið her, men hesaferð breyt hon beinið beint áðrenn hon skuldi til Føroyar, og læknin ráddi henni frá at fara, men hon var so treisk og fór allíkavæl, og hopaði at Reyði Krossur vildi hjálpa henni, hon brúkar RK í øllum londum.



Leiðarin á Lavalon í Tjarnagarði hevur biðið um fólk til bindiklubb fyri damunum har og ein vitjanarvinur hevur játtað.

Í november var landsinnsavningin hjá RKF víst sum beinleiðis sjónvarpssending í Kringvarpi Føroya. Vitjanartænastan var boðin við niðan í Norðurlandahúsið at greiða frá tænastuni í beinleiðis sendingini. Í sendingini greiddu ein vitjanarvinur og ein kona á Argjum sum móttakari so væl frá, hvussu tey upplivdu at verða vitjanarvinur og móttakari. Ein upptøka var gjørd av teimum og víst í sjónvarpinum. Alt var væl eydnað og fólk lótu sera væl at.

## Vitjanartænastan í Norðoyggjum

Í vitjanartænastuni í Norðoyggjum eru 14 vitjanarvinir og 2 samskiparar. Vitjað verður í privatum heimum, bústovnum, røktarheimum. Allir vitjanarvinir eru virknir, og tørvur er á fleiri sjálvbodnum.

Árið 2020 ávirkaði vitjanartænastuna, við tað, at ikki bar til at vitja vegna koronafarsóttina. Kontaktin var tó hildin umvegis telefon. Síðst í árinum er vitjanartænastan komin í rætt lag aftur. Vitjanartænastan hevur kontakt við Visitator hjá Norðoya Bú- og Heimatænastu, sum visiterar 75+ og avvarðandi hjá teimum, sum vitjað verður. Har koma fyrispurningar um ynski um vitjanarvinir.

Á hugnaliga tiltakinum við livandi tónleiki og sangi hjá Reyða Krossi, sum var í Spaniastovu í Klaksvík, kunnaði leiðandi samskipari fyri økið um vitjanartænastuna í Norðoyggjum og býtti út faldarar um vitjanartænastuna. Slík tiltøk hava positiva ávirkan. Faldarar liggja á ymsum stovnum í Norðoyggjum. Vit samskiparar royna at verða við til fyrstu vitjan saman við vitjanarvini, fyri at skapa kontaktina so væl sum til ber.

Av og á møtast vitjanarvinir í Norðoyggjum og samskiparar til hugnaløtur fyri at vita, hvussu vitjanarvinirnir uppliva tað at vera vitjanarvinur. Hetta eru góðar løtur, har hvør einstakur vitjanarvinur fær sagt sína uppliving. Hetta er positivt fyri allar partar.

Í Desember møttust allir vitjanarvinir og samskiparar til jólahugna í Smæruni, til góðan jóladøgurða og undirhaldið. Her fingu allir vitjanarvinir høvið til at greiða frá teirra vitjanaløtum. Arbeitt verður áhaldandi við at økja um samstarv við stovnar og kommunur kring landið.

## Vitjanartænastan kring landið

Kring landið eru fleiri nýggir vitjanarvinir nú virknir, eitt nú í Norðoyggjum, á Sandoynni, á Nesi/Toftum, í Vágunum og Kvívík. Onnur øki hava eisini víst áhuga fyri at stovna vitjanartænastu, og Reyði Krossur arbeiðir áhaldandi fyri at menna hetta týðandi øki. Ein av avbjóðingunum, sum koronafarsóttin hevði við sær, var, at fólk í nógv størri mun hava verið avbyrgd, og harvið er vandin øktur fyri at fólk kenna seg *einsamøll*.

Í mai mánað vóru umboð frá Reyða Krossi boðin til Runavíkar Kommunu, sum ynskti at hoyra meira um vitjanartænastuna. Vit greiddu frá tænastuni og hvat tey skuldu gera, fyri at koma víðari. Fleiri bygdaráðslimir vóru til staðar. Umboðini frá Reyða Krossi hoyrdu aftur, at býráðið í Runavík hevur játtað at stovna vitjanartænastu - tey mangla bara sjálvboðin at standa fyri, vónandi hoyra vit skjótt aftur. Korona órógvaði allar ætlanir hjá øllum.

Í september varð formaðurin í RKF í Miðvági og undirskrivaði samstarvsavtalu við borgarstjóran fyri Vága kommunu. Umboð fyri vitjanartænastuna í Havn vóru til staðar og greiddu frá vitjanartænastuni.

Kvívíkar Kommuna ynskti at stovna vitjanartænastu, og Rúni Gaardlykke, kommunustjóri, sendi fyrispurning til RKF um samstarv. Formaðurin í Reyða Krossi var í Kvívík og undirskrivaði samstarvavtalu við borgarstjóran í Kvívík, og leiðslan fyri vitjanartænastuna í Havn var við og greiddi frá vitjanartænastuni.

## Verkætlan at menna sosiala økið

Gransking vísur, at kenslan av *einsemi*, er økt munandi, bæði millum yngri (Kelda: Fólkaheilsuráðið) og eldri borgarar (Kelda: Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu). Hetta ynskir Reyði Krossur at gera nakað við, og tí varð avgerð tikin um at menna vitjanartænastuna, bæði fyri føroyingar og tilflytarar, kring alt landið, við løntari arbeiðsmegi. Bjørk B. Wiggins, ið hevur viðkomandi royndir og útbúgving, varð tí sett í tíðaravmarkað verkætlanarstarv frá 1. februar 2021.



## Mat- og Klædnahjálpin

Eftir 12. mars varð *Mathjálpin* løgd afturat Klædnahjálpini, sum nú verður rópt *Mat- og Klædnahjálpin.* Stórur tørvur hevur verið á hesi tænastu í 2020. Tilsamans fingu 286 fólk mat ella klæðir, og 190 av teimum vóru børn. Við góðum stuðulsavtalum við fyritøkur, kostaði hendan tænasta Reyða Krossi áleið kr. 77.000.

Í stuttum letur *Mat- og Klædnahjálpin* mat til familjur og einstaklingar, ið eru illa fyri fíggjarliga, eitt nú støkum foreldrum, familjum, har annað foreldrið hevur mist arbeiðið, familjum við lágum inntøkum, pensionistum, lesandi ella einstaklingum og familjum, ið eru rakt av sjúku. Mathjálpin letur í høvuðsheitum frystan døgurðamat. Klædnahjálpin veitir góð barnaklæðir frá klædnaskiljing okkara, til familjur í Føroyum, sum eru fíggjarliga illa fyri og hava ilt við at fáa endarnar at røkka saman. Klædnahjálpin fær nógv góð klæðir úr endurnýtsluni, ið verða latin. Harafturat senda hjartagóðar kvinnur okkum nýbundin pløgg, serliga troyggjur, húgvur og hosur at geva børnunum.

Øll, sum hava tørv á mat- ella klædnahjálp, eru vælkomin at seta seg í samband við Mathjálpina á tlf. 283670. Vit ynskja, at foreldur seta seg beinleiðis í samband, ella kundi tað verið næstringar, heilsusystrar, læknar, jarðarmøður, lærarar og onnur góð fólk. Á henda hátt meta vit, at vit betur røkka teimum, sum hava tørv á hesi tænastu.

Lýst verður við Mat- og Klædnahjálpini á heimasíðuni hjá Reyða Krossi, á fleiri øðrum viðkomandi heimasíðum og á síðum og bólkum á Facebook. Aftur í 2020 lýsti Reyði Krossur í samstarvi við Barnabata í *Jólahjálpini*, hesu ferð varð lýst við bæði *Mat- og Klædnahjálpini*.

Reyða Kross Mat- og Klædnahjálpin samstarvar við Herbergið og Frælsið, soleiðis at teirra brúkarar fáa góð klæðir og seingjarklæðir, eins og Kvinnuhúsið verður hjálpt við bráðfeingis klædnahjálp, tá tørvur er á hesum. Í sambandi við hjálpina til Herbergið eru fleiri kvinnur, sum binda húgvur og hosur til brúkararnar.

Reyða Kross Klædnahjálpin er skipað við einum virksemisleiðara og varaleiðara.

## Samstarv við Barnabata um *Jólahjálp* til barnafamiljur í fátækraváða

Á øðrum ári á rað var samstarv millum Reyða Kross og Barnabata skipað til frama fyri barnafamiljur, sum liva undir trongum fíggjarligum korum. Til hetta endamál lat Reyði Krossur gávukort áljóðandi kr. 1.000 til tær 270 barnafamiljurnar, ið fingu játtandi svar. Við góðum avsláttri frá Føroya Keypsamtøku, sum altíð er ein trúfastur stuðul hjá Reyða Krossi, kostaði hetta áleið kr. 218.000.

Mannagongdin er tann, at familjurnar kunnu søkja um jólahjálp, og umsóknirnar verða síðani viðgjørdar sambært skipaðum og alment góðkendum leisti.

Tíverri eru nógvar barnafamiljur, ið hava torført við at fáa endarnar at røkka saman, og tað gleðir okkum, at vit kunnu veita eina hjálpandi hond. Hóast felagsskapirnir báðir hava ymiskar endamálsorðingar, er hjálpin til barnafamiljur av felags áhuga.




## Samstarv við Kvinnuhúsið um at hjálpa kvinnum, sum hava verið raktar av harðskapi

Í samsvari við meginreglur og endamálsorðingar hjá feløgunum báðum, eru Kvinnuhúsið og RKF farin undir eitt samstarv um at hjálpa kvinnum og børnum í Føroyum, sum hava verið rakt av harðskapi.

Hetta verður gjørt við at bjóða viðkomandi útbúgving til sjálvboðin og starvsfólk, ið dagliga hjálpa harðskapsraktum, og við at stuðla harðskapsraktum kvinnum við børnum við neyðugari útbúgving, útgerð og, eftir tørvi, við øðrum tilboðum.

Hóast koronafarsóttin gjørdi at seinkingar komu í, endaði tað tíbetur við, at sjálvboðin í Kvinnuhúsinum fingu eitt førleikamennandi skeið í sálarligari fyrstuhjálp. Skeiðið, ið varð hildið á Hotel Føroyum, var eisini samansett av øðrum aktivitetum, sum t.d. yoga og hugnaløtum. Afturmeldingarnar vóru stak góðar, og nýggj samstarvsavtala varð undirskrivað.

## Jólagávur til Barnadeildina á Landssjúkrahúsinum, Barnaheimið og Kvinnuhúsið

Aftur í ár var RKF runt við gávum til ymisk pláss, har børn eru. Reyði Krossur hevur í fleiri ár latið bókahjálp til børn í desember, og í 2020 vórðu eisini dukkur lætnar til hetta góða átakið.

Vitjað var á Barna- og Ungdómspsykiatriini P20, og á Barna- og Ungdómspsykiatriskari Dagdeild P30, og síðani á Barnadeildini á Landssjúkrahúsinum. Aftur í 2020 varð vitjað á Barnaheiminum og bæði bøkur og dukkur lætnar. Kvinnuhúsið fekk eisini dukkur til teirra nýggja dukkuhús.

Leiðarin av bókasøluni hjá Reyða Krossi savnar gjøgnum árið bøkur til børn og ung millum 3 og 18 ár, og Reyði Krossur letur áleið 25-30 bøkur hvørt stað. Harafturat lótu sjálvboðin dukkur til hetta átak hjá Reyða Krossi, sum tey sjálvi høvdu bundið sera snøgg og vøkur klæðir til.

Allastaðni har vit komu, vóru starvsfólkini sera glað fyri vitjanina og fyri gávurnar, og tað ljóðar, at gávurnar koma serstakliga væl við í tí dagliga arbeiðinum og í arbeiðinum við menningini av børnunum.

## Integratión

Seinnu árini eru alsamt fleiri tilflytarar komnir til Føroya, og fleiri teirra koma úr londum uttanfyri ES. Reyða Krossur Føroya ynskir at hjálpa við at fremja integratiónina fyri okkara nýggju borgarar.

Reyði Krossur hevur síðani 2018 skipað fyri einari familjulegu, ætlað fólki við tilflytarabakgrund. Legan verður vanliga hildin í oktober mánað í Nesvík, og hevur verið sera væl eydnað. Umframt hugnaløtur og undirhald, varpar legan ljós á avbjóðingar, ið fólk við tilflytarabakgrund hava, tá tey flyta til Føroya. Tíverri gjørdi koronafarsóttin, at tað var neyðugt at avlýsa leguna í 2020.

Í september mánað bað Reyði Krossur um ein sang frá Steintór Rasmussen, ið lýsti humaniteru avbjóðingarnar, ið Reyði Krossur arbeiðir við til dagligt, og sum varpaði ljós á ta serstøku støðu, sum føroyingar hava til hjálpararbeiðið kring heimin. Ynskið við sanginum var at lýsa hvussu tað er at búgva mitt úti á Norðuratlantshavinum, og samstundis hava eina ábyrgd fyri heimsins mest viðkvomu menniskjum. Sangurin skal eftir ætlan brúkast til integratiónsøkið hjá Reyða Krossi. Steintór skrivaði hareftir frálíka sangin *Tað kundi verið eg*, ið síðani varð frumframførdur í landsinnsavningini í november. Tað eru næmingar á Skúlatrø, ið syngja sangin, og hevur hann verið nógv spældur í útvarpinum síðani.

Eisini hevur Reyði Krossur skipað fyri *Sambinding / Intertwining*, ið hevur verið hildið á bókasøvnum kring landið. Hetta er eitt tiltak, har tilflytarar og føroyingar hugna sær saman, koma at kennast og læra av hvørjum øðrum. Vegna manglandi undirtøku, hevur *Sambinding / Intertwining* tíverri verið óvirkið síðani várið 2019. Arbeitt verður við at tillaga leistin fyri hetta áhugaverda átak, og sum nevnt, er avgerð tikin um at seta Bjørk B. Wiggins, ið hevur

viðkomandi royndir og útbúgving, varð tí sett í tíðaravmarkað verkætlanarstarv frá 1. februar 2021, at menna integratiónsøkið og vitjanartænastuna, bæði fyri føroyingar og tilflytarar, kring alt landið. Bjørk fer eisini at arbeiða við at íverkseta eitt annað tilboð, ið verður kallað *Familjuvinir*, sum er ein vitjanartænasta og eitt netverk fyri tilflytarar.

## ABC fyri sálarliga heilsu

Í samstarvi við Fólkaheilsuráðið og aðrar stovnar og felagsskapir í Føroyum er RKF vorðin partur av verkætlanini *ABC fyri sálarliga heilsu*. Hendan verkætlanin er tann fyrsta universella ætlanin, ið vil siga, at hon er ætlað øllum íbúgvum í landinum. Endamálið er at *fremja sálarliga heilsu manna millum*.

Higartil er hetta tað fyrsta átakið, sum bæði er grundað á gransking, er burðardygt og hevur víst seg at verið møguligt at seta í verk og breiða út í stórum máti. Gransking vísir, at sálarlig heilsa verður styrkt og hildin við líka, við at einstaklingar eru virknir og luttaka í felagsskapi og kenna, at lívið gevur meining. Hetta er sera viðkomandi fyri virksemið hjá RKF.

Endamálið við ABC verkætlanini er:

1) At eggja fólki til at gera eitthvørt fyri at styrkja sálarligu heilsuna hjá sær sjálvum og øðrum.
2) At tryggja góð kor fyri sálarligari heilsufremjan við at leggja dent á karmarnar rundanum.

Reyði Krossur raðfestir ABC verkætlanina innanhýsis soleiðis, at tvey afturvendandi trivnaðartiltøk verða hildin fyri sjálvbodnum hvørt ár: ein útferð um summarið og ein jólahugni. Hesi tiltøk verða skipað við viðurkenning fyri øllum sjálvbodnum hjá Reyða Krossi, sum árið runt stríðast fyri at hjálpa øðrum, bæði her í Føroyum og úti í heimi.

Vitjanartænastan er harumframt virkin í samstarvsfundum innan ABC verkætlanina. Eins og við øllum øðrum, varð neyðugt at avmarkað hesi tiltøk orsaka av koronafarsóttini.

## Ung í Reyða Krossi

Nógv ung eru virkin innan tey ymisku virksemisøkini hjá Reyða Krossi. Í 2019 varð farið í gongd við at varpa ljós á teir møguleikar, ið ung hava at gera mun fyri onnur, bæði í Føroyum og kring heimin. Tíverri varð ikki møguligt at skipa fyri viðkomandi kunningarferðum ella øðrum tiltøkum á hesum øki í 2020. Vónandi verður tað aftur, so skjótt, sum umstøðurnar loyva tí.

## Innsavningar

Reyði Krossur skipar fyri hesum innsavningum, til frama fyri heimsins veikastu menniskju: frímerkjainnsavningin/filateli, peningakistlar og landsinnsavning. Hóast umstøðurnar við koronafarsóttini, gekk árið 2020 sum heild sera væl fyri innsavningarnar. Nevnast skal, at Landsinnsavningin hevði metgott úrslit.

### Frímerkir

Hendan inntøka sær framvegis út til at vera minkandi. Tal av brøvum er fallandi, og harvið eisini frímerkini. Tilfarið, sum kemur inn, verður klipt og sent niður til uppboðssølu. Sum nakað nýtt fingu vit í ár hjálp frá einum frítíðarskúla, har umleið 8 børn stuttleikaða sær við at klippa frímerkir av brævbjálvum. Tíverri var eingin inntøka fyri frímerkir í 2020.

### Peningakistlar

Ein peningakistil er á flogvøllinum, og ein er nú hjá Visit Tórshavn í Steinatúni. Kistilin á flogvøllinum varð tømdur í desember 2020 og har vóru áleið kr. 450 í. Orsøkin til hesa lítlu upphædd er allarhelst tann, at færri ferðafólk hava verið, og at kistilin hevur fingið annað pláss og sostatt hevur verið lættur at yvirsæð. Kistilin í Steinatúni varð tømdur á heysti 2020 og har vóru áleið kr. 5.000 í.




### Landsinnsavningin

Innsavningin í 2020 var ikki, sum hon hevur verið tey seinastu árini. Koronafarsóttin gjørdi, at loyvi frá fútanum ikki varð givið fyrr enn umstøðurnar loyvdu tí, og ætlanin var tí at útseta ella avlýsa alt. Hóast loyvið umsíðir varð givið, so valdi nevndin at avlýsa siðbundnu *hurð-til-hurð* innsavningina til tess at avmarka smittuspjaðing.

Við góðari hjálp frá skrivstovuni, og øðrum góðum fólki, fingu sjálvboðin innan landsinnsavningina uppá bara 6 vikur heldur skipað fyri eini stuðulskonsert, sum var víst beinleiðis í KvF sunnudagin 15. november.

Tiltakið varð hildið í Norðurlandahúsinum, og varð samansett av innsløgum frá hjálpararbeiðinum hjá RKF í Føroyum og úti í heimi, við tónleikainnsløgum frá Marius, Eivør, Danny, Vestmonnum og Lenu Anderssen. Sum nakað nýtt, vóru øll, ið ringdu á tlf. 90565, við í

lutakastinum um ein *Suzuki Swift Hybrid*, sum Berg Motors valdi at geva til endamálið. Eisini varð drigið lut um 10 gávukort frá FK á kr. 2.000 ímillum tey, ið ringdu.

Hetta tiltakið sett øll met, og inn komu áleið kr. 3.750.000. Hvussu landsinnsavningin framyvir skal verða skipað er enn óvist, men arbeitt verður við tí.



Endamálið við landsinnsavningini 2020 var at savna pening til neyðhjálparátøk hjá Reyða Krossi, bæði heima og úti. Pengarnir fara til keyp av teppum, tjøldum, reinførispakkum, heilivági og til reint vatn. T.d. røkka kr. 150 til 3.000 litrar av reinum drekkivatni, kr. 200 røkka til tjaldbúðir at verja tvær flóttafólkafamiljur móti regni og vindi, og kr. 500 røkka til mat til 15 hungrað børn í ein mánaða. Partur av inntøkuni frá landsinnsavningini verður goymdur, soleiðis at Reyði Krossur skjótt kann veita eina hjálpandi hond, eitt nú um farsótt, jarðskjálvti, turkur ella onnur vanlukka brádliga rakar.

## Altjóða hjálpararbeiði

RKF lat í 2020 áleið kr. 4.000.000 til altjóða humaniterar verkætlanir í 8 ymiskum londum. Humaniteru verkætlanirnar høvdu í høvuðsheitunum til endamáls at fremja kropsliga og sálarliga heilsu, útbúgving, ávaringarskipanir fyri veðurlagshóttanir, lívsgrundarlag og aðra neyðhjálp, serliga til kvinnur og børn, ið liva undir serliga viðkvomum korum. Harumframt vóru átøk ímóti koronafarsóttini raðfest høgt.

Tíverri eru eftirmetingarnar fyri altjóða átøkini, ið fingu stuðul frá RKF í 2020, ikki lidnar fyrr enn um nakrar vikur. Eftir ætlan verður ein samlað frágreiðing løgd út á heimasíðuna hjá RKF, so skjótt eftirmetingarnar eru tøkar.

### Karmar

RKF hevur samstarvsavtalu við Føroya Landsstýrið um veiting av altjóða humaniterari hjálp. Samstarvsavtalan inniber millum annað, at Landsstýrið letur ein part síni játtan til humanitera arbeiðið til RKF.

Við avtaluni fær RKF betur skipað sítt virksemið, eitt nú við at senda arbeiðsorku úr Føroyum út í heim. Arbeitt verður miðvíst við at íverkseta samstarvsavtaluna, til tess at tryggja, at hjálpin verður veitt bæði skjótt og væl, og sambært viðkomandi treytum.

Harumframt hevur RKF samstarvsavtalu við RKiD um veiting av altjóða humaniterari hjálp. Samstarvsavtalan við RKiD inniber eitt nú at stuðulin, ið RKF veitir til altjóða átøk verður sendur út í heim umvegis RKiD, men uttan at umsitingargjald verður goldið til RKiD.

*Menningarætlanin hjá RKF fyri humanitert arbeiði í Føroyum og úti í heimi 2018-2020*, lýsir framtíðar visjónina hjá felagsskapinum, sum er:

*at víðarimenna førleikarnar at basa og lætta um menniskjasliga neyð og líðing við at virka fyri effektivari humaniterari hjálp til tey mest sárbæru, bæði í Føroyum og í øðrum londum*

Øll altjóða átøk og stuðul frá RKF í 2020 vórðu brúkt sambært samstarvsavtaluni við Landsstýrið, samstarvsavtaluni við RKiD og Menningarætlanina hjá RKF. Arbeiðið at gera eina nýggja menningarætlan varð tíverri seinkað orsakað av koronafarsóttini.

Kr. 1.712.500 vóru lætnar í samstarvi við Landsstýrið, og kr. 2.287.500 vóru lætnar frá uppsparingum hjá RKF.

## Altjóða starvsfólk hjá RKF

RKF virkar fyri at økja um føroyska luttøku í altjóða hjálpararbeiði sambært menningarætlanin, í samstarvi við RKiD og sambært samstarvsavtaluni við Landsstýrið.

RKF sett eitt starvsfólk á altjóða deildini hjá DRK í Keypmannahavn í november 2019. Sum heild hevur hetta eydnast sera væl, og RKF hevur fingið kunning um, at tað framvegis er tørvur á hesari arbeiðsorku. Avgerð var tí tikin um at leingja starvið í eitt ár afturat. Altjóða starvsfólkið hjá RKF starvast við at samskipa, íverkseta og leggja hjálpararbeiði til rættis úti í heimi.

Arbeiðsstaðurin hjá altjóða starvsfólkinum er í Keypmannahavn, men avgerð varð tikin seint í 2020 um, at senda viðkomandi út til delegatarbeiði til Kenja fyrst í 2021. Innanfyri karmarnar av samstarvsavtaluni við landsstýrið rindar RKF fyri útbúgving og løn hjá altjóða starvsfólkum.

Í 2020 arbeiddi altjóða starvsfólkið við áleikandi og bráðfeingis kreppum kring allan heim, eitt nú við stóra eldsbrunanum í Australia, sosialum- og koronatengdum átøkum í Kenja, átøkum í samband við eldgos í Filipsoyggjum, átøkum ímóti yvirflóð í Indonesia, at menna nýggja *Forecastbased Action* (FbA) tøkni og menning av forritum og skipanum at íverkseta bráðfeingis hjálparátøk.

Eitt starvsfólk var sent til Kambodja vegna RKF frá 2009-2011, og eftir ætlan sendur RKF ein verkætlanardelegat til Malavi í august 2021.

## Kunningar- og rekrutteringsátøk

Avtala er gjørd við RKiD um rekruttering av starvsfólkum í Føroyum. Lýst verður harav við leysum størvum innan hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi í føroysku miðlunum og á heimasíðu og sosialum miðlum hjá RKF.

Harvið verður arbeitt við at skipa fyri kunningartiltøkum á hvørjum ári, har gestarøðarar frá øðrum landsfeløgum vera bodnir á vitjan at greiða frá, hvussu hjálpararbeiðið ítøkiliga gongur fyri seg úti í heimi.

Av tí at RKiD skipar altjóða hjálpararbeiðið fyri RKF, gongur sjálv umsóknargongdin umvegis heimasíðuna hjá RKiD. Í 2020 vóru tvey altjóða starvsfólk hjá Reyða Krossi í Føroyum og høvdu framløgur, bæði í Norðurlandahúsinum og í Klaksvík. Hesi tiltøk vóru væl eydnað.

Undanfarin ár hevur RKF sent sjálvboðin á kunningarferðir til hjálparátøk kring heimin. Orsakað av koronafarsóttini var tíverri ikki gjørligt at senda nakran avstað í 2020.

## *Forecast-based action* í Simbabvi

Simbabvi verður tíðum rakt av álvarsomum veðurlagskreppum. Eitt nú hevur turkur við sær, at fólk í nógvum økjum ikki hava atgongd til mat og drekkivatn, og at reinførið og heilsutrygdin eru avmarkað.



Við at brúka tøknina Forecast-based Action (FbA), sum nýtir veðurfrøði og váðalýsingar til at spáa um, eitt nú, turrveður í framtíðini, ber til at síggja frammanundan, og sostatt fyrireika matvøruframleiðsluna á møguligan turkur. Á hendan hátt kann FbA brúkast til at fyribyrgja hungursneyð.

RKF lat 300.000 kr. til FbA verkætlan í Simbabvi í 2020.

Á facebookvanganum hjá RKF ber til at síggja ein stuttan film, ið greiðir frá, hvussu Reyði Krossur nýtir FbA í Simbabvi.

## Grundleggjandi neyðhjálp í Libanon

Spreingingin í Beirut 4. august 2020 hevði ræðuligar avleiðingar fyri býin og fyri landið. Fleiri hundrað menniskju lótu lív, aftur fleiri komu til skaða, og fleiri hundrað túsund gjørdust heimleys, tá stórir partar av býnum vóru lagdir í oyði.



Saman við teimum kr. 500.000 frá Føroya landsstýri, gjørdi RKF av at senda kr. 200.000 afturat til Libanon, fyri at stuðla í stóru neyðini, ið rakti landið í kjalarvørrinum av hesi syrgiligu vanlukku.

Spreingingin rakti meint í einum landi, sum frammanundan var hart rakt av fíggjarligari kreppu og øktum fátækradømi. Libanon hýsir tilsamans 1,5 milliónum flóttafólkum, og COVID-19 smittan hevur eisini verið álvarslig.

Reyði Krossur í Libanon hevur arbeitt hart fyri at útvega teimum nógvu heimleysu fyribils innivist, neyðuga útgerð til persónligt reinføri, maskur og heilt grundleggjandi neyðhjálp, sum mat og vatn.

Tørvurin á hjálp var stórur í Libanon í 2020, og RKF lat tí kr. 150.000 afturat til Reyða Kross í Libanon. Talið av flóttafólki er nógv økt í hesum lítla landinum við Miðalhavið seinastu árini, og í dag er Libanon eitt tað landið í heiminum, ið hýsir flest flóttafólkum.  Hendan støðan ger, at allar tænastur í Libanon eru undir stórum trýsti, og nógv fólk liva í ringum fátækradømi, uttan at fáa nokk av mati, og uttan atgongd til neyðuga læknahjálp. At ganga í skúla er nakað, sum fleiri hundraðtúsund børn og teirra foreldur bara kunnu droyma um. Peningurin frá RKF fer eitt nú til at menna tilboð um sálarliga hjálp til tey nógvu flóttafólkini, til at tryggja verju móti harðskapi, sum økist, so hvørt sum lívskorini hjá fólki versna, og til grundleggjandi neyðsynjarvørur.

Tilsamans sendi RKF sostatt kr. 850.000 til hjálparátøk í Libanon í 2020.

## Altjóða katastrofutilbúgvingin (DREF)

Frágreiðingin frá altjóða Reyða Krossi, *World Disaster Report 2020*, vísur á, at veðurlagsbroytingarnar uttan samanbering eru størsta hóttan ímóti menniskjaættini. Heimsumfatandi gransking vísur, at áleið 90% av humaniterum kreppum kring heimin hava við veðurlagið at gera.

2020 hevur víst, at tað ber til at reagera skjótt, tá á stendur, sum til dømis við koronafarsóttini. Um vit megna at taka koronafarsóttina í álvara, eiga vit so eisini av álvara at taka tøk ímóti veðurlagsbroytingum – og ongantíð ov skjótt.

RKF hevur valt at stuðla Forecast-based Action (FbA) verkætlanum, ið hjálpa londum í Afrika, sum eru rakt av álvarsomum veðurlagskreppum, eitt nú skerpingi, vatnflóð og ódnarveðri. Forecast-based tøknin nýtir veðurfrøði og váðalýsingar til at meta um nær og hvussu álvarsligar vanlukkur fara at raka.

Við at fráboða um eitt nú framtíðar turrveður og vatnflóð, ber til at fyrireka matframleiðsluna og annað frammanundan, og soleiðis fyribyrgja hungursneyð og øðrum álvarsomum humaniterum kreppum. RKF lat kr. 500.000 til altjóða katastrofutilbúgvingina umvegis RKiD.



## Styrkja mótstøðuførið í Malavi

Hóast Malavi, sum er kent fyri sítt gestablídni, verður kallað ”Heita Hjartað í Afrika”, so líða nógvir malavar stóra neyð. Malavi telist millum heimsins fátækastu og minst framkomnu lond, og meir enn helvtin av borgarunum liva undir fátækramarkinum. Harumframt liggur Malavi í einum ábærum øki, sum á hvørjum ári er fyri náttúruvanlukkum, so sum skerpingi og flóð. Vánalig atgongd er til heilsu- og reinføristænastur, sum hava alstóran týdning fyri heilsuna og vælveruna hjá borgarum. Serliga eru tað mammur og børn undir fimm ára aldur, sum eru sárbær í hesum støðum.

Ein onnur avbjóðing í Malavi er skúlagongd. Serliga illa stendur tað til hjá skúlagentum; einans 29% av gentunum, sum byrja í fyrsta flokki, fullføra útbúgvingina. Høvuðsorsøkirnar til fráfallið í útbúgving eru hjúnaband á ungum aldri, barnsburður og familjuskyldur. Í Malavi verða áleið 50% av gentum giftar áðrenn tær eru 18 ára gamlar.



RKF lat síðst í farna ári 150.000 kr. til eina verkætlan hjá Reyða Krossi í Malavi, við heitinum ”Community Resilience Programme”. Endamálið við hesi verkætlan er trífaldað. Fyrst er tað at menna heilsu- og reinføristænastur, harímillum tryggja reint drekkivatn og upplýsing um kynsliga heilsu, fyribyrging og familjufyrireikingar. Næsta endamálið er at síggja til, at tað verður upplýst um veðurlag, og kunnað um amboð og førleikar sum skulu fyrireika og minka um avleiðingarnar av náttúruvanlukkum.

Seinasta endamálið er at styrkja mótstøðuføri hjá børnum og ungum, sum er framtíðin í Malavi. Hetta verður eitt nú gjørt við at eggja til betri skúlagongd og útbúgvingar, umframt førleikamenning, sum skal betra um arbeiðs- og inntøku møguleikarnar hjá ungum malavum.

Samstundis lat RKF 50.000 kr. til Barnalandið í Malavi, eins og hevur verið gjørt seinastu árini. Barnalandið í Malavi hjálpir millum annað foreldraleysum og útsettum børnum við at stuðla teimum at fara undir skúlagongd, og bjóðar barnaansing, mammubólkar og ungdómsarbeiði. Ein partur av hesi játtanini er frá privatum gevarum, sum hava oyramerkt stuðulin til Barnalandið í Malavi, og ein partur er frá RKF.




## Lívbjargandi hjálp til Sýria

Kreppan í Sýria hevur staðið á síðan í 2011, og hevur havt sera álvarsamar avleiðingar fyri fólki í landinum. Ófriður og ótryggleiki mynda framvegis støðuna. Altjóða Reyði Krossur metir, at fleiri enn 12 milliónir Sýrar eru flýddir frá húsi og heimi.

Veturin í Sýria kann vera sera harður, við langum tíðarskeiðum, við kava og kuldastigum. Tey, sum ikki hava eitt heim, eru serliga sárbær í kuldanum, og eru tey mong, ið ikki hava hóskandi klæðir ella skjól. Seinasta vetur lótu nógvir Sýrar, harímillum fleiri børn, lív á rýmingarleiðini í kuldanum.

RKF lat í 2020 kr. 500.000 í hjálp til Reyða Hálvmána í Sýria, í sambandi við verkætlanir, ið hava til endamáls at veita linna og hjálp til grundleggjandi tørvin hjá teimum mest viðkvomu. Verkætlanin fevnir eitt nú um bráðfeingis útgerð til tvingsilsfluttar familjur, lívbjargandi hjálp, so sum viðgerðir á viðgerðarstovnum, sálarligan stuðul og umráðandi kunning.

## Trygdarnet til neyðstødd í Etiopia

Ófriður og ótryggleiki mynda í løtuni støðuna í Tigray landslutinum í norður Etiopia. Humanitera kreppan í økinum er sostatt vorðin alsamt meira álvarsom, og stórur tørvur er á hjálparátøkum.



Stór fólkaflyting sæst, og fleiri enn 30.000 etiopar hava leitað sær friðskjól í Sudan, og fleiri hundrað etiopar hava latið lív. Tigray landsluturin er heimstaður fyri fleiri enn 600.000 etiopar, sum hava tørv á mathjálp og bráðfeingishjálp. Eisini hava 1 millión etiopar tørv á einum trygdarneti. Grundað á meginregluna um neutralitet hevur Reyði Kossur fingið loyvi frá stríðspørtunum, at flyta neyðstødd, sum hava tørv á læknahjálp, til heilsudeplar ella sjúkrahús. Harumframt, arbeiðir Reyði Krossur í Etiopia við at leita eftir familjulimum, ið eru burturblivnir orsakað av ófriðinum í Tirgray landslutinum.

RKF lat kr. 300.000 til hjálparátøk hjá Reyða Krossi í Etiopia í 2020.

## Korona og neyðhjálparátøk í Kenja

Altjóða starvsfólkið hjá RKF, Vár í Dali, hevur ein týðandi leiklut sum humaniterur ráðgevi og samskipari í hjálparátøkum í Kenja. Umvegis altjóða deildina í Keypmannahavn, arbeiðir Vár eitt nú við at samskipa átøk í samstarvi við Reyða Kross í Kenja, sum røkir týðandi hjálpartænastur í tøttum samstarvi við Kenjanskar heilsumyndugleikar.



Koronafarsóttin er bæði ein váði fyri fólkaheilsuna í økinum, men er eisini ein humaniter avbjóðing fyri menningarlond, har trygdarnet og heilsumyndugleikar framanundan eru undir stórum trýsti vegna náttúruvanlukkur, veðurlagsbroytingar og kríggi.

Reyði Krossur í Kenja, hevur ein umráðandi leiklut í at avmarka koronafarsóttina millum borgararnar í landinum, og arbeitt verður tætt saman við heilsumyndugleikunum í landinum innan øki sum sálarheilsu og psykososialan stuðul (PSS). Ein liður í verkætlanararbeiðinum er at veita upplæring og venjing innan sálarheilsu og psykososialum stuðli.

RKF hevur valt at lata kr. 650.000 til humaniterar verkætlanir í Kenja.

## Grundleggjandi neyðhjálp til Jemen

Stríðið í Jemen hevur havt við sær, at fleiri enn 2.000 skúlar hava verið fyri skaða ella eru heilt lagdir í oyði. Mett verður, at meir enn 2 milliónir børn mangla skúlagongd.

Yvir 22 milliónir menniskju hava tørv á bráðfeingis hjálp í Jemen. 8 milliónir menniskju mangla mat, og hungurneyð ræður millum 3 milliónir kvinnur og børn.

ST hevur almannakunngjørt, at spenta støðan í landinum ger Jemen til heimsins størsta humanitera kreppustað. Heilsuverkið er undir stórum trýsti, og einans 50% av heilsuverkinum er virkið í løtuni. Ein avleiðing av hesum er, at 16 milliónir menniskju hava tørv á heilsu- og læknaviðgerð.



RKF lat tí kr. 500.000 í neyðhjálp til Jemen í 2020. Stuðulin fer til verkætlanir, ið áhaldandi arbeiða fyri at betra um lívskorini í Jemen, eitt nú verkætlanir innan reinførið, mathjálp, vatn og grundleggjandi heilsutænastur. Við hesum stuðlinum fær Jemenski Reyði Hálvmáni tryggjað, at tænasturnar í teimum fimm heilsuklinikkunum, sum Jemenski Reyði Hálvmáni og RKiD reka, kunnu halda áfram, og at arbeitt verður við sálarligu heilsuni hjá borgarum í Jemen. At tryggja hesi er ikki minni umráðandi í hesum døgum, nú familjur í Jemen eru fyri enn einum ósjónligum vanda – koronafarsóttini.